# Toppurin av ísfjallinum

**– Eg havi einans fingið atgongd til brotpart av tilfarinum um Føroyar, ið liggur í russisku skjalagoymslunum. Nógvar av skjalagoymslunum, ið vóru latnar upp fyrst í nítiárunum, eru í dag latnar aftur, og tí fáa vit helst ongantíð alla søguna, sigur danski søgufrøðingurin Bent Jensen, ið skrivaði Reyðubók**

REYÐABÓK
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*


*– Nógv skjalatilfar um Føroyar liggur framvegis goymt í russiskum goymslum, sum atgongd helst ongantíð fæst til, sigur danski søgufrøðingurin Bent Jensen*

Var Reyðabók komin fyrst í nítiárunum, hevði hon helst sæð munandi øðrvísi út. Upplýsingarnar høvdu bæði verið fleiri og ikki minst neyvari. Tað er Bent Jensen, ið skrivaði frágreiðingina, sannførdur um. 65 ára gamli søgufrøðingurin hevur síðan hann var ungur havt stóran áhuga fyri og granskað í Sovjetsamveldinum og Eysturevropa, og hann hevur verið við øll árini síðan skjalagoymslurnar eystanfyri vóru lætnar upp fyrst í nítiárunum. Men seinastu árini er vend komin í.

– Ein kann bara staðfesta, at viljin til opinleika er minkandi. Alt fleiri dyr verða lætnar aftur.

Orsøkin er helst fyri stóran part, at tað er komið óvart á myndugleikarnar, hvussu nógvir upplýsingar eru komnar undan kavi í russisku skjalagoymslunum.

– Her tosi eg ikki einans um goymslurnar hjá hermegini ella fregnartænastuni, men eisini í goymslum hjá kommunistaflokkinum, uttanríkismálaráðnum osv. Her hava søgufrøðingar funnið upplýsingar, ið hava skakað myndugleikarnar, greiðir Bent Jensen frá.

Sjálvur fann Bent Jensen millum annað upplýsingar í skjalasavninum hjá russiska uttanríkismálaráðnum, ið skjalprógvaðu, at formaðurin í kommunistaflokkinum í Danmark, Axel Larsen, lat neyvar, hernaðarligar upplýsingar til sovjetisku hernaðarleiðsluna.

– Tað kann tykjast løgið, men á nógvum økjum roynir nýggja Rusland at verja gamla Sovjetsamveldið. Og so hvørt sum fleiri upplýsingar eru komnar undan kavi, hava myndugleikarnir svara aftur við at skerja atgongdina til skjalagoymslurnar, greiðir Bent Jensen frá.

### Úrslitaleys áheitan

Eitt skifti sá so svart út hjá danska søgufrøðinginum, at hann bað føroyska landsstýrið um at heita á russar um at vísa størri samstarvsáhuga. Men einki hjálpti.

– Áheitanin frá landsstýrinum til russisku myndugleikarnar var úrslitaleys. Eftir mínum tykki varð áheitanin skúgvað til viks.

Eisini danska uttanríkismálaráðið og danska sendistovan í Moskva hava roynt at ávirka russar, men tað hevur verið sum at sletta vatn á gás, heldur Bent Jensen.

Bent Jensen hevur verið í Moskva tríggjar ferðir í samband við Reyðubók. Eisini ætlaði hann sær at vitja Sankta Pætursborg, har stórur partur av skjalasavninum hjá sovjetiska herflotanum liggur. Men har var eingin atgongd.

### Stórpolitikkur

Tað var fyri fýra árum síðan, at táverandi løgmaður, Anfinn Kallsberg, heitti á Bent Jensen um at fara undir arbeiðið at lýsa støðu Føroya í Kalda Krígnum. Hóast hann sum nevnt ikki slapp fram at nógvum tilfari, so hevur arbeiðið verið sera áhugavert, sigur Bent Jensen.

– Tað hevur verið áhugavert at sæð, hvussu Føroyar hava verið partur av stórpolitiska spælinum millum Danmark, Sovjetsamveldið og USA. Øðrumegin hevur Danmark ynskt góð viðurskifti, bæði við Sovjet og USA, og samtíðis hevur Danmark skula tikið atlit til Føroyar. Og av hesum eru nakrar tvístøður íkomnar, har Danmark hevur valt ikki at spæla við opnum kortum mótvegis føroyingum.

### Persónar

Bent Jensen greiðir frá, at í hansara arbeiði sum søgufrøðingur hevur tað stóran týdning at vera so neyvur sum gjørligt. Og tískil eru persónar, har tað hevur verið møguligt, nevndir við navni. Til dømis, hvørjir persónar høvdu ein leiklut í ymsum rørslum og flokkum.

Reyðabók nevnir nógvar persónar, ið so ella so høvdu ein virknan leiklut í føroyska samfelagnum undir kalda krígnum.

Sjálvur hevur Bent Jensen ikki tosað við persónarnar, ið eru nevndir í Reyðubók. Frágreiðingin byggir einans á skrivligt tilfar.

Bent Jensen vónar, at Reyðabók, saman við Svørtubók, verður nýtt sum grundarlag hjá fólki at gera sær eina meting av leikluti Føroya undir Kalda Krígnum.

Hóast arbeiðið við Reyðubók er liðugt, so sleppur danski søgufrøðingurin ikki Kalda Krígnum. Í løtuni er hann í holt við stóra frágreiðing um Danmark í Kalda Krígnum, ið skal vera liðug um tvey til trý ár.

# Reykjavík sum sølupallur til Føroya

**Royndir vísa, at ferðafólk, sum koma til Reykjavíkar, ofta eisini fáa áhuga fyri Føroyum og Grønlandi, meðan tey eru í Útnorði, sigur projektleiðarin á kunningarstovuni hjá Reykjavíkar Kommunu**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*


*Dóra Magnúsdóttir, projektleiðari á Reykjavík Complete, sum er kunningarstovan hjá Reykjavíkar Kommunu, heldur, at vit eiga at gera meira burtur úr at fáa fremmand ferðafólk, sum vitja Ísland eisini at taka Føroyar og Grønland við um somu leið*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Reykjavík:**
Føroyingar eiga at gera meira burtur úr at lýsa við ferðum til Føroya í Reykjavík, tí higar koma nógv ferðafólk, sum fyrstu ferð hoyra um Føroyar, meðan tey eru her og her fáa áhuga fyri hesum nýggja landinum, sigur kunningarleiðari í Reykjavík.

Dóra Magnúsdóttir er deildarleiðari á kunningarstovuni hjá Reykjavíkar Kommunu. Hon sigur, at ein partur av arbeiði teirra er at styrkja Útnorðursamstarvið, og at tað verður gjørt við at upplýsa um Føroyar og Grønland og selja ferðafólki, ið kemur til Reykjavíkar, pakkaferðir til hesi bæði grannalondini hjæa Íslandi.

– Tað er onkur, sum eisini tekur av slíkum tilboðum, og tey fara so einar tveir dagar ella so, alt eftir, hvussu tað passar við flutningi, til hesi londini, hóast tey ikki hava verið so øgiliga nógv í tali enn.

Hetta átti at verið ein marknaður hjá føroysku feðravinnuni at gjørt burturúr, heldur Dóra Magnúsdóttir. Tí rákið í løtuni er, at ferðafólk vilja leita sær til ókend og friðalig ferðamál. Serliga eftir 11. september 2001.

– Serliga amerikanarar eru týdningarmiklir fyri okkum at fáa, sigur hon. Og tað ber til at selja teimum pakkaferðir til Grønlands, so Føroyar mátti eisini borið til at fingið teir at vitja, heldur hon. Trygdin og friðurin er tað avgerandi fyri ferðafólk í løtuni, staðfestir hon og vísir á, at her í Útnorði kenna vit einki til yvirgangsasóknir og slíkt, sum ræðir fólk bæði í Europa og í Amerika.

Tað er ikki tí, at hetta ikki er roynt, at hendan ferðslan millum Ísland og Føroyar eftir hesum mynstri, sum Dóra Magnúsdóttir skjýtur upp, ikki er tann stóri marknaðurin hjá okkum, sigur Per Hansen, varastjóri á Ferðaráð Føroya. Atlantsflog hevur roynt, og vit hava onkrar møguleikar at søkja um stuðul til eitt nú marknaðarføring á økinum. Men tað hevur enn ikki givið tað stóra.

Hóast tað heldur Dóra Magnusdóttir, deildarleiðari á kunningarstovuni hjá Reykjavíkar Kommunu, at við miðvísari marknaðarføring eigur hetta við tíðini at fara at bera til.



# Eingin avgerð um útvarpsgjaldið

**Hóast útvarpsgjaldið skal krevjast inn í apríl mánað, so er framvegis eingin avgerð tikin um umbønina frá ÚF um at hækka gjaldið við 200 krónum. Hendir einki, noyðist stovnurin at skerja lønarútreiðslurnar 2,5 milliónir krónur**

ÚTVARPSGJALD
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*


*Í 1998 vóru útreiðslurnar til lønir og samsýningar 54 prosent av samlaðu fíggjarætlanini hjá ÚF, men í fjør var hesin partur komin upp í 70 prosent. Tí verður tað á hesum øki, at møguligar sparingar skulu finnast*


*– Hækkar útvarpsgjaldið ikki 200 krónur skulu 2,5 milliónir sparast á lønarútreiðslunum, sigur Jógvan Jespersen, útvarpsstjóri*

Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum, hevur framvegis ikki tikið avgerð um, hvørt umbønin frá Útvarp Føroya um at hækka útvarpsgjaldið við 200 krónum skal gangast á møti.

– Eg skilji væl, at útvarpinum tørvar fleiri pengar, og at málið hevur skund. Men enn havi eg ikki tikið støðu, sigur Jógvan á Lakjuni.

Vanliga verður útvarpsgjaldið kravt inn í apríl mánaða. Harumframt er tað ein sannroynd, at møguligar sparingar verða alsamt truplari at fremja, longur líður út á árið.

Útvarpið er í tí støðu, at hækkar gjaldið ikki við 200 krónum, so skal stovnurin spara 2,5 milliónir krónur í ár. Jógvan Jespersen, útvarpsstjóri, vil ikki meta um, hvørja ávirkan hetta fær á stovnin. Men hann slær fast, at øll sparingin má fremjast á útreiðslunum til lønir og samsýningar.

– Vit hava ikki viðgjørt spurningin enn, tí vit vóna ikki, at støðan verður aktuel, sigur Jógvan Jespersen.

Í 1998 vóru útreiðslurnar til lønir og samsýningar 54 prosent av samlaðu fíggjarætlanini hjá ÚF, men í fjør var hesin partur komin upp í 70 prosent.

– Peningur til rakstur, viðlíkahald og íløgur skal finnast á okkara egnu fíggjarætlan, og her ber snøgt sagt ikki til at spara meira. Lønarparturin er nú so stórur partur av samlaðu útreiðslunum, at møguligar sparingar mugu finnast her, sigur Jógvan Jespersen.

### Umbøn í summar

Tá Útvarpið í juni mánað í fjør sendi sína fíggjarætlan fyri 2004 til góðkenningar í Mentamálaráðnum, varð biðið um loyvi at hækka útvarpsgjaldið við 200 krónum.

Í september mánað gav Høgni Hoydal, ið tá sat sum landsstýrismaður í mentamálum, útvarpinum tilsøgn um, at umbønin fór at verða gingin á møti. Tað váttar Høgni Hoydal fyri Sosialinum í dag.

– Tjóðveldisflokkurin ynskir eitt kringvarpsgjald, har goldið verður eftir inntøku, tvs. at hægstu inntøkurnar gjalda mest, í staðin fyri útvarps- og sjónvarpsgjaldið. Men tá ikki bar til at fáa undirtøku fyri hesum í samgonguni, tók eg undir við at hækka útvarpsgjaldið, sigur Høgni Hoydal og vísir á, at bæði útvarpið og sjónvarpið eru bundin av lønarhækkingunum í samfelagnum, og at stovnarnir ikki fáa hesar eyka útreiðslur endurgoldnar nakrastaðni.



*Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum, hevur enn ikki gjørt av, um útvarpsgjaldið skal hækka*

### Ósemja um gjaldið

Tað er landsstýrismaðurin í mentamálum, sum einsamallur ásetur útvarps- og sjónvarpsgjaldið við kunngerð. Men løgtingsval varð útskrivað, áðrenn kunngerðin varð lýst, og síðan hevur nýggj samgonga tikið við.

– Tað er greitt, at eg sum landsstýrismaður skal áseta útvarpsgjaldið. Men samtíðis er tað eisini ein spurningur um, hvat politisk undirtøka er fyri í samgonguni, sigur Jógvan á Lakjuni.

Hann hevur tó ikki hug at gera viðmerkingar til, um partar av samgonguni ikki taka undir við at hækka gjaldið.

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, váttar, at málið hevur verið fyri á samgongufundi, men annars vil hann ikki leggja seg út í málið.

Tá Annlis Bjarkhamar, fyrrverandi landsstýrismaður í mentamálum, kom við uppskotinum um kringvarpsgjald, var Fólkaflokkurin ímóti, og tískil fekst ikki semja í samgonguni um tann spurningin. Nakað eftir valdi Annlis Bjarkhamar so at ganga umbøn frá Sjónvarp Føroya á møti og hækkaði sjónvarpsgjaldið upp í 2000 krónur.

Jógvan á Lakjuni sigur, at spurningurin um kringvarpsgjald ella fjølmiðlaskatt ikki er aktuellur, og tískil ikki er við í støðutakanini hjá landsstýrismanninum.

### Sjálvstøðugir stovnar

Sum nevnt er tað landsstýrismaðurin í mentamálum, sum á hvørjum ári skal áseta útvarps- og sjónvarpsgjaldið við kunngerð.

Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldisflokkinum, heldur hesa mannagongd vera sera óhepna.

– Tað er óheppið, at ein landsstýrismaður einsamallur skal hava so stóra ávirkan á loftmiðlarnar, og tí mæla vit framvegis til at skipa útvarpið og sjónvarpið sum sjálvstøðugar stovnar undir eini nevnd, sigur Høgni Hoydal.


*– Tá undirtøka ikki fekst fyri kringvarpsgjaldinum gekk eg umbønini hjá ÚF um at hækka útvarpsgjaldið á møti, sigur Høgni Hoydal, fyrrverandi landsstýrismaður í mentamálum*